

# Frankie Jensen stevnir barndómsfelagnum

**Málið um Frankie Jensen og B71 skal viðgerðast í rættinum í vikuni. Hann vil hava pengarnar frá barndómsfelagnum, sum sáttmálin hevði tryggjað honum**

Uni Holm Johannesen

Uppsøgnin kom óvart á.

- Vit hava púra einki at finnast at, men tað riggaði ikki millum hann og leikararnar. Tí verður tað soleiðis, segði Ragnar Fossdalsá, sum er formaður í B71, við Sosialin hin 5. august í fjør.

Fótbóltsfelagið í Sandoynni spældi í næstbestu deildini og hevði beina kós móti uppflyting í bestu deildina, tá Frankie Jensen varð sagdur úr starvinum sum venjari hjá B71. Tað var miðskeiðis í kappingarárinum í fjør.

Frankie Jensen hevði fingið úrslitini, sum nevndin kravdi. Tað var eingin trupulleiki millum venjaran og nevndina. Men innanhýsis stríð við leikararnar var orsøkin, at venjarin noyddist úr sessinum.

Nú hevur Frankie Jensen, sum ættaður av Sandoynni, stevnt B71 eftir gott og væl 250.000 krónum í endurgjaldskravi.

- Tað er samsýning, sum eg ongantíð havi fingið. Tað er ikki við góðum treysti, at eg stevni barndómsfelagið, men tað vísir seg, at eg og nevndin finna ikki eina semju í hesum málinum, sigur Frankie Jensen.

### Ikki fult endurgjald

Frankie Jensen fekk uppgávuna at stjórna besta mansliðnum hjá B71 í 2009. Men tað var greitt, at um liðið flutti upp í Vodafonedeildina, skuldi sandoyingurin halda fram í starvinum.

Tað stóð í sáttmálanum, sum formaðurin og Frankie Jensen høvdu skrivað undir.

Sandoyingar vóru væl við í stríðnum um uppflyting, tá Frankie Jensen varð loystur úr starvinum.

- Tú kann kanska siga, at tað er løn fyri tvey ár, sum eg vil hava, sigur hann.

Frankie Jensen er skjótur at leggja afturat, at hann krevur ikki fulla samsýning.

Eli Hentze loysti Frankie Jensen av. Sandoyingar vóru nummar tvey í røðini av 10 liðum, tá kappingarárið var liðugt. FC Suðuroy og B71 fluttu upp í bestu deildina.

### Ikki virðilig framferð

Frankie Jensen er 37 ára gamal.

Fyrst í nítiárunum var hann millum stuðulsleikararnar hjá B71. Hann hevur spælt 53 dystir fyri felagið í alt.

Frankie Jensen er vónbrotin av viðferðini, sum barndómsfelagið hevur givið honum.

- Tað er lítið virðiligt, men eg harmist um, at málið er farið so langt, sigur Frankie Jensen.

Málið verður viðgjørt í rættinum hósdagin.

*uni@sosialurin.fo*

## Tí varð hann uppsagdur

Frankie Jensen fekk greið boð, tá hann tók av venjarastarvinum.

Liðið skuldi vinna sær sætið í bestu deildini.

Úrslitini vóru eisini væl og virðiliga nøktandi, tá Frankie Jensen varð uppsagdur.

Nevndin var í tvístøðu, tí leikararnir boðaðu frá, at teir ynsktu ikki at halda fram undir leiðslu av Frankie Jensen.

Nevndin fekk fleiri kærur frá leikarunum, sum eisini greiddu venjaranum frá, hvat teir mettu.

Niðurstøðan var, at annað hvørt góvust fleiri av leikarunum ella noyddist Frankie Jensen úr starvinum.

Venjarin segði, at hann kundi finna ein leikarahóp úr høvuðsstaðnum, men tað vildi nevndin ikki.

Og tí varð Frankie Jensen sagdur úr starvinum.

## B71 eigur ikki pengarnar

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Ragnar Fossdalsá í morgun.

Men formaðurin í B71 segði í viðtalu við Norðlýsið hin 22. apríl í ár, at Frankie Jensen hevur sett órímiligt krav.

- Vit kunnu ikki góðtaka at gjalda 290.000 krónur í endurgjaldi, tí vit eiga snøgt sagt ikki pengarnar, segði formaðurin í B71.

Nevndin og Frankie Jensen hava roynt at funnið eina semju, men tað hevur ikki eydnast.



# Borgarstjórin ignorerar býráðslimirnar

**Tað var bara Heðin Mortensen, og eingin annar, sum tók avgerðina, at parkeringsbásarnir skuldu burtur á Kongabrúnni, sigur Marin Katrina Frýdal**

Uni Holm Johannesen

Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevði ikki undirtøku, tá parkeringsbásarnir á Kongabrúnni brádliga hvurvu.

Tað sigur Marin Katrina Frýdal, sum er býráðslimur í Havn.

Sosialurin skrivaði fríggjadagin, at Byggi- og býarskipanarnevndin mælti til at taka básarnar burtur, og ferðslunevndin mælti frá.

Tað er ikki rætt, sambært Marin Katrinu Frýdal.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælti eisini frá at taka parkeringsbásarnar burtur.

Tí hevur borgarstjórin einmælt samtykt, at fólk kundu ikki seta bilin á Kongabrúnni í summar.

- Heðin Mortensen hevur ikki lurtað eftir okkum, og tað eru fleiri býráðslimir týðiliga argir um. Uppgávan hjá borgarstjóranum er fyrst og fremst at standa fyri samtyktunum, men hann hevur ignorera okkum í hesum málinum, sigur Marin Katrina Frýdal.

### Misnýtir valdið

Heðin Mortensen greiddi frá í Sosialinum, at parkeringsbásarnir skuldu burtur, tí drotningavitjanin, ólavsøkan og annað var á skránni í summar.

- Drotningin skuldi jú ganga handan vegin, tá ið hon fór út í Tinganes, segði Heðin Mortensen.

Men Marin Katrina Frýdal skilir als ikki grundgevingina.

- Tað er eingin orsøk at flyta parkeringsbásar, tí drotningin skal ganga framvið har í fá sekund, sigur Marin Katrina Frýdal.

Sosialurin royndi at fáa viðmerking frá Heðini Mortensen í morgun, men borgarstjórin var ikki at hitta.

*uni@sosialurin.fo*